# ítróttur

Nr. 98 • fríggjadagur • 27. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Havnar Fimleikafelag stóð seg best

**Um vikuskiftið luttóku trý føroysk fimleikalið í heimsmeistarakappingini í estetiskum fimleiki í Greve í Danmark. Hóast estetiskur fimleikur ikki er vanligur her á landi, stóðu føroysku liðini seg stak væl**

FIMLEIKUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kappingin um heimsmeistaraheitið í estetiskum fimleiki fór fram í Greve Idræts Center fríggjadagin og leygardagin í farnu viku. Talan var um eitt óalment HM, har 29 lið úr 13 ymiskum londum tóku lut.

### Rukku ikki finaluna

Liðini, sum tóku lut í óalmennu HM-kappingini, taldu millum 6 og 10 luttakarar. Fimleikararnir skuldu framføra eina seriu upp á umleið hálvantriðja minutt.

Fríggjadagin var innleiðani umfarið, har 10 lið skuldu vinna sær rætt at taka lut í finaluumfarinum, sum var dagin eftir.



*Havnar Fimleikafelag endaði framman fyri hini bæði føroysku liðini og tey trý donsku liðini, so havnarkvinnurnar gjørdist bestar í kongaríkinum*

Tað var væntandi, at Havnar Fimleikafelag fór at standa seg best av teimum føroysku liðunum. Liðið hjá Havnar Fimleikafelag gjørdist føroyameistari fyrr í ár, men hini bæði liðini úr ávíkavist Ljósinum og Støkk kundu, um tey raktu dagin, eisini gera ein vørr. Tað gekk eisini væl hjá føroysku liðunum við teirra framførslum fríggjadagin, men tó restaði nakað í, áðrenn tey nærkaðust einum sessi í finaluni dagin eftir.

Havnar Fimleikafelag stóð seg best av teimum trimum føroysku liðunum, og liðið fekk karakterin 12,15, ið var nóg mikið til eitt 22. pláss.

Ljósið og Støkk vóru rættuliga jøvn. Ljósið fekk 10,65 stig og gjørdist nummar 26, meðan Støkk fekk 10,10 stig og gjørdist nummar 27 av teimum 29 liðunum, ið tóku lut í HM-kappingini.

### Best í kongaríkinum

Sum skilst vóru føroysku liðini væl nøgd við síni avrik, og ikki minst hjá Havnar Fimleikafelag var nakað at fegnast um. Liðið endaði nevnliga framman fyri besta danska liðið úr Greve, og tískil gjørdust føroyameistararnir bestar í danska kongaríkinum.

At eitt føroyskt lið endar fremst av liðunum innan ríkisfelagsskapin í einari kapping í estetiskum fimleiki, er eitt megnaravrik, tí estitiskur fimleikur er eitt púra nýtt fyribrigdi í Føroyum, og føroysku fimleikararnir hava bert vant hetta slag av fimleiki í eitt heilt stutt tíðarskeið.

Eftir FM-kappingina her heima fyrr í ár, vóru tað eisini fleiri innan fimleikin, ið vildu verða við, at dømingin hevði verið ivasom, og sum tískil settu spurnartekin við, um Havnar Fimleikafelag var rætti føroyameistarin.

Hetta er nakað, ið hevur plágað tær í HF síðani, og tí høvdu tær við spenningi sæð fram til kappingina í Greve, har tær við altjóða dómarum fingu høvi at prógva, at tær vóru besta føroyska liðið í løtuni. Tað gjørdu tær so dyggiliga, og harvið má staðfestast, at allur ivi um rætta føroyameistaran er skúgvaður til viks.

Russiska liðið Roxett gjørdist ein greiður vinnari av HM-kappingini Í Greve. Tær fingu tilsamans 37,60 stig. Nummar tvey gjørdist Frida úr Finlandi við 36,55 stigum, meðan estiska liðið Piruett gjørdist nummar trý við 26,50 stigum. Hægsta stigatalið, ið eitt lið kundi ogna sær í HM-kappingini, var 40,00 stig.



*Estetiskur fimleikur er eitt heilt nýtt fyribrigdi í Føroyum, og tað má metast sum eitt megnaravrik, at føroysk lið standa seg so væl í altjóða kappingum*

## Stjørnan fingið serbiskan venjara

Klaksvíkar Ítróttarfelag boðaði hósmorgunin frá, at felagið hevur gjørt avtalu við nýggjan venjara til komandi kappingarár. Talan er um 48 ára gamla Lazarkordic, sum áður hevur verið venjari hjá Jugoslaviskum ungdómslandsliðumm, umframt at hann eisini hevur verið venjari í jugoslavisku kappingini.

Hesin kemur nú at virka sum høvuðsvenjari í felagnum. Eitt starv, sum Svein Rógvi Nielsen annars hevur røkt seinnu árini.

**-jm**

## FM í amboðsfimleiki 2005

**Leygardagin 28. og sunnudagin 29. mai 2005 verður árliga FM kappingin í amboðsfimleiki fyri einstaklingar, í bólki 3 og bólki 4. Kappingin verður hildin í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Byrja verður báðar dagarnar kl. 14.00**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Kappingin er býtt í tvey. Fyrra dagin, leygardagin 28., verður kappast um samlaða Føroyameistaraheiti í hvørjum bólki. Kappingin leygardagin er samstundis kvalifikation til kappingina sunnudagin. Seinna dagin, sunnudagin 29., kappast 6 teir bestu fimleikararnir í hvørjum amboðið fyri seg.

Tey luttakandi feløgini eru: Havnar Fimleikafelag, Klaksvíkar Fimleikafelag, Ljósið og Støkk. Tilsamans 33 fimleikarar luttaka. Hesir eru.

**Gentur: Bólkur 3**

| | |
|---|---|
| Kira Danielsen | Ljósið |
| Vár Poulsen | HF |
| Silja Højgaard | Støkk |
| Sólja av Skarði | Ljósið |
| Fríðhild Norðgerð | Støkk |
| Elinborg T. Durhuus | Ljósið |
| Brim H. Hoydal | Ljósið |
| Erla S. Patursson | HF |
| Sissal Fossá | Ljósið |
| Annika Dimon | HF |
| Kristina Toftegaard | Støkk |

**Gentur: bólkur 4**

| | |
|---|---|
| Henny Joensen | Støkk |
| Marta N. Hansen | HF |
| Anna Joensen | Støkk |
| Anita Knudsen | Støkk |
| Sonja Joensen | Støkk |
| Birita Dahl-Christiansen | HF |
| Monika Poulsen | Støkk |

**Dreingir: bólkur 3**

| | |
|---|---|
| Jóni B. Christiansen | HF |
| Øssur D. Eiriksfoss | HF |
| Jákup Debus | Støkk |

**Dreingir: bólkur 4**

| | |
|---|---|
| Jóhan H. Jóhannesen | KF |
| Kristian í Lon Olsen | Støkk |
| Eyðstein Lútzen | KF |
| Eyvind A. Hansen | HF |
| Rúni Lamhauge | Støkk |
| Johnleif Højgaard | Støkk |
| Rósing Dam | HF |
| Bárður Mikladal | KF |
| Uni Mikkelsen | KF |
| Høgni R. Øster | HF |
| Hans Jákup Østerø | KF |
| Rasmus Purkhús | KF |